# ítróttur

Nr. 40 • Fríggjadagur • 24. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

## Brakið bíðar til mikudagin

**Greiðir favorittar eru til mansdystirnar í hondbólti um vikuskiftið. Mest spennandi dysturin í hesum umfarinum bíðar til mikukvøldið**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Mest spennandi mansdysturin hetta umfarið verður ikki spældur fyrr enn mikukvøldið. Tá vitjar VÍF hjá H71 í enn ein av teimum dystunum, sum kunnu fáa heilt avgerandi týdning fyri vónirnar hjá liðunum fyri at røkka FM-finaluni.

Leygar- og sunnudagin verða tó eisini hondbóltur á skránni. Leygardagin skal StÍF á vitjan hjá KÍF. Einki er at ivast í, at strandingar eru stórfavorittar til dystin. Men StÍF hevur fleiri ferðir víst, at teir hava tað trupult í teimum á pappírinum løttu dystunum. Nakað sum varð so dyggiligа undirstrikað, tá KÍF vann dystin á Skála í endaspælinum.

Sunnudagin verður so grannauppgerð í høllini á Hálsi, tá Neistin og Kyndil skulu takast. Her tykist eingin ivi vera um, at Kyndil er favoritturin. Men eisini Neistin hevur havt hug at glepsað nakað at hinum liðunum í ár, so talan kann eisini verða um óvæntaðan spenning.



*StÍF er favorittur til dystin ímóti KÍF, men StÍF hevur fleiri ferðir víst, at teir hava tað trupult í teimum á pappírinum løttu dystunum*

## Endurtaka finaluna



*TB skal vinna dystin ímóti ÍF um vikuskiftið, skulu kvinnurnar av Tvøroyri varðveita møguleikan at vinna gull í FM*

**TB kann taka seg eitt sindur meira inn á oddaliðið Drátt, um liðið kann endurtaka sigurin á ÍF í steypafinaluni síðsta vikuskiftið – hesaferð hittast liðini í landskappingini**

FLOGBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kvinnuliðini hjá ÍF og TB hittast aftur sunnudagin. Seinastu ferð liðini hittust, var tá TB seinasta leygardag vann steypafinaluna, og einki er at ivast í, at ÍF ætlar sær at hevna hetta. Samstundis er talan eisini um dystin, sum meira ella minni kann avgera stríðið um silvurmerkini í kvinnudeildini.

Eftir at Dráttur tapti sín dyst mitt í vikuna, er møguleikin framvegis til staðar fyri, at TB kann fáa oddaliðið aftur, men so skulu kvinnurnar av Tvøroyri vinna dystin ímóti ÍF.

Í hinum kvinnudystinum hetta vikuskiftið tekur SÍ móti botnliðnum, Mjølnir.

Hjá monnunum er talan somuleiðis um silvurdyst, tá SÍ og Mjølnir takast. Mjølnir sýndi í steypafinaluni, at teir hava kvalitetirnar at lyfta liðið heilt móti tindunum. Og so er spurningurin, hvørt teir megna tann leiklutin enn einaferð.

**Dystir um vikuskiftið**

**Hondbóltur**
**Sunset-kappingin - FM-bólkurin**

| Dagur | Klokkan | Dystur | Dómarar |
|---|---|---|---|
| 26.02 | 14.30 | Neistin-Kyndil | Heri & Dánjal |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 25.02 | 16.00 | KÍF-StÍF | Kári & Dánjal |
| 26.02 | 16.00 | Neistin-Kyndil | Heri & Dánjal |

**Flogbóltur**
**Meistaradeild kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 26.02 | 14.00 | ÍF-TB | KÍF |
| 26.02 | 14.30 | SÍ-Mjølnir | KÍF |

**Meistaradeild menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 26.02 | 16.00 | SÍ-Mjølnir | ÍF |

## Jón Rói og Súni sama venjara

Svenski venjarin hjá AaB hevur longt sín sáttmála við felagið, so at hann heldur fram til endan av 2008.

Ivi hevur í eina tíð verið um, hvørt Erik Hamrén fór at halda fram sum venjari hjá AaB. Hann hevur fingið fleiri tilboð frá feløgunum heima í Svøríki, og hann hevur ikki vilja sagt avgjørdur, hvat hann ætlaði sær, tá ið sáttmálin gekk út í ár.

Nú er avgerðin tikin, og Erik Hamrén hevur longt sáttmála við AaB við trimum árum, so at hann stendur á odda fyri liðnum hjá Jón Róa Jacobsen og Súna Olsen til endan av 2008.

Ítróttarstjórin í AaB, Lynge Jacobsen, fegnast um, at tað hevur eydnast felagnum at leingja sáttmála við Hamrén.

– AaB hevur eina spennandi framtíð. Vit hava nógvar evnaríkar spælarar og vit hava fingið ein góðan hugburð millum spælararnar. Harafturat er felagið eisini betur fyri fíggjarliga, sigur Erik Hamrén.

## SÍ nýggjan formann

Føroysku fótbóltsfeløgini skifta ófort formenn í hesum døgum, og seinast hevur SÍ – sum bæði umfatar fótbólt og flogbólt – fingið nýggjan formann. Eftir aðalfundin hevur starvsnevndin í felagnum skipað seg við Eivin Jacobsen sum formanni. Rannvá Gásdal er næstformaður og skrivari og Jóhan á Ørg er peningarøkil. Fótbóltsnevndin og flogbóltsnevndin hava ikki skipað seg enn.

## Venja í stórum hita

Føroyska fótbóltslandsliðið sleppur rættiliga at sveitta undir venjingunum í Florida í hesum døgum. Hósdagin var hitin um tey 30 stigini, og tá er strævið at spæla fótbólt. Fríggjadagin vandu spælararnir fyrrapartin kl. 10 og seinnapartin kl. 16.00. Hitin var tann sami, men roknað varð við, at tað fór at verða skýggjað eina løtu. Seinnapartin hósdagin høvdu spælararnir frí, og tá gjørdu teir eina útferð. Teir bæði koyrdu í gocartbilum og royndu annað til stuttleika.